# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Noomi Thomsen 35 ára starvsdag

Fríggjadagin 23. oktober 2009 skipaði býráðsleiðslan í Klaksvíkar Kommunu fyri hátíðarhaldi í býráðshøllini fyri Noomi Thomsen, fulltrúa á Roknskapardeildini, í sambandi við hennara 35-ára starvsdag hjá kommununi.

Í dag er ikki so ofta, at starvsfólk hava sín 35-ára starvsdag hjá sama arbeiðsgevara, men júst hetta kundi býráðsleiðslan hátíðarhalda fyri Noomi Thomsen, sum hevði sín fyrsta starvsdag á býráðsskrivstovuni 15. oktober 1974, har hon hevur starvast øll árini, burtursæð frá 1989 til 1992, tá ið hon starvaðist sum bókhaldari og umsiting á Klaksvíkar Havn.

Noomi Thomsen starvast í dag sum fulltrúi á Roknskapardeild kommununnar, har hon hevur ábyrgd av stórum parti av bókhaldinum og dagliga samskiftinum við deildir og stovnar kommununnar.

Millum gestirnar við hetta hátíðarhald vóru starvsfelagar og býráðslimir, umframt hennara næstu.

Noomi hevur hesi 35 árini upplivað eina kollvelting innan bókhaldsførslu og skipanir, heilt frá so at siga manuellum



bókingum til edv-skipanir, sum í dag enntá verða knýttar saman í eina og somu fíggjarstýringsskipan landsins. Sjálv greiddi hon frá, at hon nú hevur arbeitt við ikki færri enn fimm ymiskum kontu skipanum.

Í heiðursrøðu sínari fyri Noomi segði Gunvá við Keldu, borgarstjóri, at tað munnu vera fá starvsfólk hjá kommununi, sum hava samband við so nógv ymisk starvsfólk hjá kommununi, tí allar deildir og stovnar kommununnar hava hesa einu og somu roknskapardeild, har hvørt einasta skjal verður skrásett.

- So at siga hvør einasta rokning og flyting hjá kommununi fer um hendurnar hjá Noomi, og tað er ikki smávegis, tí árliga talið av skjølum í bókhaldinum er umleið 16000, sum fylla einar 100 brævordnarar.

- Tað sigur seg sjálvt, at eitt slíkt starvsfólk hevur ein sentralan leiklut í býráðsumsitingini, og hetta kemur sanniliga ikki av ongum og heldur ikki eftir einum degi.

- Tað avrik, sum Noomi í øll hesi ár hevur framt, ber boð um eina kvinnu, sum leggur lív og sál í sítt arbeiðsavrik og starv og hon hevur eisini stórt álit millum øll tey fólk, sum hava við hana at gera, nevndi borgarstjórin í røðu sínari.

Vegna býráðið handaði borgarstjórin Noomi eitt blómutyssi og eina gávu sum tøkk fyri góða tænastu og fyrimyndarligt samstarv í hesi 35 árini.

Noomi bar síðan fram eina hjartans tøkk til sín arbeiðsgevara og starvsfelagar, har hon eisini greiddi frá gongdini og broytingunum arbeiðsplássinum.

Eisini fyrrverandi borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen, nýtti høvið at bera fram eina heilsan.

- Vit ynskja Noomi hjartaliga tillukku og ynskja henni alt tað besta framyvir við vón um framhaldandi gott samstarv í mong ár framyvir, heilsa tey av býráðsskrivstovuni í Klaksvík.

# Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Peter Absalon Johannessen**
Klaksvík

doyði og varð jarðaður.

Takk til Hanus á Gørðum, prest, fyri góð og troystarrík orð í kirkjuni.
Takk fyri blómur, kransar og gávur.
Takk til tykkum øll, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervið og til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Annebeth**
**Palle, Elsebeth og Jenny við familju**

# Takk

Eina hjartans tøkk til tykkum øll, sum gjørdu okkum diamantbrúdleypsdagin so hugnaligan.
Tøkk til Eysturoyar Dansifelag og so eina stóra tøkk til alla familjuna fyri teirra stóra hjálpsemi.

**Heilsan**
**Sonja og Hans Jacob á Reynatrøð, Leirvík**

# MERKISDAGAR

**70 ára føðingardagur**
Sunnudagin 1. nov. verður Elsa Egilsnes, Vestmanna, 70 ár. Dagurin verður hildin á Fjørukrønni frá kl. 16. Øll eru vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Týsdagin 27. okt. verður Rósing Rasmussen, Runavík, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**80 ára føðingardagur**
Hósdagin 5. nov. verður Sámal Christiansen, vanliga nevndur Sámal hjá Barbu, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin í Skálanum leygardagin 7. nov. Opið hús er frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Hósdagin 29. okt. fyllir Jensia Svabo Thomasen, Sandavágur, 90 ár. Dagurin verður hildin heima, Giljavegur 62, frá kl. 18.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 2. nov. hava Óluva og Jónfríður Nielsen, Saltangará, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
30. nov. hava hjúnini Alberta og Eirikur Magnussen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 28. nov. í HB-Húsinum kl. 19. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga fra á tlf. 216324 (Alberta) ella 214456 (Eirikur) innan 14. nov.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 1. nov. hava Kristina og Hans Andrias Jacobsen (Stina og Dia av Syðradali), gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin 7. nov. í Bøgøtu 3, Klaksvík. Vælkomst verður frá kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Kristinu og Hans Andrias, kunnu siga frá á tel. 456737 ella 458625.

**Gullbrúdleyp**
28. nov. hava hjúnini Tóra og Ólavur Nolsøe Olsen, Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík leygardagin 5. des. kl. 18. Tey ið vilja halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 444159 - 737751 ella toraolavur@gmail.com áðrenn 20. nov.

†

## Andlát og jarðarferðir

Jarðarferðin hjá **Per Hansen** verður úr Elim í Søldarfirði mikudagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Per, kunnu lata Elim í Søldarfirði eina peningagávu. Konto í Føroya Banka.

**Johannes Hansen, Tórshavn**, vanliga nevndur **Hannes hjá Gásadal**, ættaður úr Sumba, andaðist sunnudagin, 78 ára gamal. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Hannus, kunnu lata Nýrafelagnum eina peningagávu. Konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra dóttir, mamma, omma og langomma

**Ása Udbø**
úr Havn
búsitandi í Hirtshals

andaðist á Hospice Vendsyssel í Frederikshavn sunnudagin 25. okt., 60 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Familjunnar vegna*
**Julianna, Poula og Karstin við familju**

# Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður mín, okkara góði pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Hans Frederik Huusgaard**
ættaður úr Syðrugøtu,
fyrrverandi lærari,
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Hera Joensen, prest.
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og hjálp til jarðarferðina.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Hjørdis**
**Hansina, Eyðun, Marjun, Heri og Rannvá**

**Dagurin**

27. oktober. Sem. Hann var elsti sonur Nóa og var ættfaðir at semitisku fólkasløgunum. Navnið er hebráiskt og merkir sonur ella arvingi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*